**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Úttøkuskipan til NMU 2025 í Tórshavn

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi kravtíðarskipan til Norðurlendsku Meistarastevnuna fyri Ung sum verður í Tórshavn 5. og 6. juli 2025.

Uppá tal eru tey sum í kravtíðarskeiðnum klára avrik yvir 600 AQUA (2024) stig á langgeil (50m).

Sí AQUA 2024 talvurnar her:

- Kvinnur: World-Aquatics-Points-LCM_2024_Female-.pdf
- Menn: World-Aquatics-Points-LCM_2024_Male-.pdf

Dømi: Pál Joensen hevur svomið besta føroyska avrik yvirhøvur, sum var 14:46.33 í 1500 frí á langgeil á HM í Shanghai í 2011, sum tá gav 960 AQUA stig meðan talvurnar nú siga 949 AQUA stig.

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at taka út eyka svimjarar, sum lýst í úttøkuskipanini til eyka úttøkur:

https://ssf.fo/kapping/uttokuskipan-til-eyka-uttokur/

Starvsnevndin tilskilar sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. januar 2025, og at velja luttøku frá um serligar umstøður tala fyri hesum.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 2. juli 2024 (NMU 2024), til og við 26. apríl 2025 (Tórshavn Open 2025)

Árgangirnir eru svimjarar føddir 2009-2012.

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:
http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir svimjarar ið hava klárað kravtíð, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

Við svimjikvøðu

Starvsnevnd SSF

ATLANTIC AIRWAYS